

*- Eg haldi, at laksurin hevur góðan luktisans. Honum dámar ikki tá menn standa og roykja, og tí havi eg mangan fingið laks, meðan hinir einki hava fingið, sigur Sofía Jacobsen við einum brosi. Hon eigur sítt fasta pláss her við Leynavatn*

hevur hon drigið mangan laksin upp á land millum ár og dag. Her hevur hon havt síni føstu pláss. Í dag er staðið tað tættasta, ið ein kann koma til við bili: Beint oman á sandin, og hesumegin lítlu ánna, ið rennir til tey ovaru vøtnini.

So hegnisliga, sum um hon ikki hevði gjørt annað í sínum langa lívi, setur hon stólin upp, pakkar tráðuna út og festir boyuna, húkin og agnið á línuna. Nú er klárt at kasta.

- Ja, nú verður spennandi at vita, um nakar man bíta á. Eg veit av royndum, at tað er altíð líka stuttligt, hóast eg einki fái. Tað er líkasum sjarman við tí at fiska laks.

- Men sjálvandi er altíð stuttligast um ein ella fleiri laksar bíta á, sigur hon bjartskygd.

Nú er bert upp til laksin at avgera, um hetta verður dagur í viku hjá Sofíu. Framvið vatninum standa aðrir menn í somu ørindum. Teir hava heldur einki fingið enn!

*Eg veit av royndum, at tað er altíð líka stuttligt, hóast eg einki fái. Tað er líkasum sjarman við tí at fiska laks*

*Týsdagin fekk hon ein laks, ið vigaði 9 pund og var 73 cm. langur, og fríggjadagin fyri ein annan uppá 5 pund og var 60 cm. langur*

## So herligt at sita her

Hóast ein skuldi trúð, at júst hetta við laksafiskarí, annaðhvørt tað so er í sjógvi ella landi, var fyri mannfólk, so er Sofía eitt dømi um tað øvugta. Hon hevur altíð fiskað!

Heilt frá barnaárum hevur fiskarí havt hennara stóra áhuga. Og Leynavatn og hini bæði norðaru vøtnini veit hon alt um.

- Eg eri uppvaksin í Kollafirði, og har høvdu vit fjøruna sum eitt av okkara spæliplássum. Og tað var mangan at vit, ungdómarnir plagdu at fara her oman til vøtnini at fiska laks.

- Jú, her átti eg mangar góðar løtur. Og her havi eg framvegis mangar góðar løtur, sigur Sofía sum kann fiska frítt, tí hon er kosin heiðurslimur í Sílaveiðifelagnum.

Tað tók kortini sína tíð, áðrenn menninir við Leynavatn rættiliga vildu viðurkenna, at ein kona var komin upp í part við laksafiskarínum.

Um hetta var ein ógrundaður ótti fyri at hon skuldi troka teir burtur, er ikki gott at vita. Men teir fingu kortini annað at síggja, tí her høvdu teir fingið eina fitta og fryntliga kvinnu ímillum sín, og sum eisini hevði laksin sum sítt frítíðarítriv.

- Nei, teir góðtóku tað ikki beinanvegin, men tað vardi tíbetur ikki leingi, fyrrenn teir gjørdust so øgiliga sjeikaligir!, sigur hon við einum stórum brosi.

## Njóti vakurleikan

Sofía gjørdist einkja í 2002, men saman við manni sínum, høvdu tey bæði mong felags áhugamál. Enn í dag bankar eitt gamalt, men kortini íðið Frelsunarhershjartað í barmi á 84 ára gomlu kvinnuni.

Eitt av felagsáhugamálum teirra var at royna fiskieydnuna við Leynavatn, ta tíðina ið loyvt er at fiska her - frá 1. mai til 1. oktober.

Síðani hann doyði hevur hon ikki verið eins ofta og fiskað, men tá hon fær møguleikan og onkur bjóðar henni við, er hon til fiskaríið fús beinanvegin.

Tað gjørdi hon eisini, tá umboð fyri Sosialin var á gátt hjá henni mánadagin í somu ørindum. Uttan at spyrja um veður og vind, var svarið játtandi til umbønina um at fara á Leynavatn eftir døgurða týsdagin.

- Hetta er eitt gott pláss at vera í. Tað er herligt bara at sita soleiðis og njóta náttúruna, vatnið og vakurleikan, meðan eg bíði eftir fongi.

- Man slappar simpelten so væl av. Ein leggur alt annað frá sær, og tí kann eg sita her í tímavís, bara eg fái loyvi til tað, sigur aldrandi laksafiskarin.

## Lorkaði hann burtur

Tann stóri spurningurin og spenningurin hjá laksamonnunum og -kvinnunum er, um tað man eydnast at fáa fong í dag.

Ein kann hava roynt ein heilan dag á mongum ymiskum støðum, og einki fáa. Og so kann ein til aðrar tíðir bara kasta út, og hava ein laks á beinanvegin.

Hetta sama mundi hent hjá Sofíu, tá hon seinnapartin í gjár kastaði út á fyrsta sinni: Agnið var rækja, og tað gekk ikki minutturin, til tann fyrsti laksurin beit á!

- Tað var býtt, at eg soleiðis lorkaði hann burtur, sigur hon eitt sindur hørm á málinum.

Hon er kortini ikki harmari enn so, enn at hon veit at hetta er gerandiskostur hjá royndum laksafiskarum.

- Tað krevur eitt Jobs tol at fiska laks. Men tað er tað góða við tí, sigur Sofía sum ikki bert er tolin við Leynavatn, men eisini hevur verið tað heima við hús gjøgnum 84 ára langa lív sítt.



*- Tey siga, at tað er nógvur laksur her í Leynavatni. Eg veit líka - higartil í dag havi eg ongan fingið, men bara sæð ein leypa úr vatninum. Eg haldi, at teir duga væl at skrøgga, sigur 84 ára gamla Sofía Jacobsen*